## Funnu herskip á botni

Vísindamenn hava funnið eitt franskt herskip, sum týski kavbáturin "U-64" søkti í Miðjarðarhavinum í 1917. Herskipið, sum eitur "Danton", stendur á kjølinum á umleið 500 favna dýpi, og myndir vísa, at tað er í sera góðum standi. "Danton", sum var 150 metrar langt og 19.000 tons stórt, bleiv søkt 20 fjórðingar sunnan fyri Korsika. Umleið 1.000 mans vóru við skipinum. Tað eydnaðist øðrum skipum at bjarga umleið 700 av manningini, men 296 fóru niður við skipinum, tá tað sakk.



## USA skal úr Kirgigistan

Tjóðartingið í Kirgisistan samtykti í gjár eitt uppskot frá stjórnini um at geva USA boð um at lata sína herstøð í landinum aftur. Avgerðin sigst vera treyt fyri, at Kirgigistan kann fáa búskaparliga hjálp úr Russlandi. Eftir samtyktini skulu amerikanararnir fara haðani innan 180 dagar. Amerikanska herstøðin í Kirgisistan hevði stóran týdning fyri amerikonsku herdeildirnar í Afghanistan, men ein talsmaður hjá NATO sigur, at støðan hevur ikki so stóran týdning longur.

## Ongin revsing

Er tað soleiðis, at onkur ikki hevur hug at svara nøkrum sum helst, so hevur peningastovnurin sum so ongar veruligar sanktiónsmøguleikar.

Í hvítvaskilógini stendur í paragraff 13, stk. 2, at um váttan av samleika ikke kan foretages i overensstemmelse med § 12, stk. 1-4, må der ikke etableres et fast kundeforhold, optages forretningsmæssig forbindelse eller udføres transaktioner for kunden. Det skal samtidigt undersøges, om der skal foretages underretning efter § 7.

Hetta vil við øðrum orðum siga, at bankin kann stongja kontuna hjá fólkum, ið ikki koma við upplýsingunum.

Ein onnur avleiðing kann verða at føroysku peningastovnarinir fáa verri lánstreytir frá útlendskum peningastovnum vegna tað, at teir ikki kunnu ávísa, at teir lúka hvítvaskingarlóggávuna. Hetta vil, alt annað líka, føra til hægri lánskostna til føroyskar kundar, sigur løgfrøðingur innan bankaheimin. Hann leggur afturat, at hann ikki skilur, hvussu fólk kunnu ræðast hesar spurningar, tí bankin hevur longu nógv meiri umfatandi upplýsingar, enn tað sum verður upplýst í spurnarbløðunum.

# Terroristar kannast í

**Hóast hvítvasking av peningi og terrorisma ikki eru nakað, vit hoyra um dagliga í Føroyum, so skulu allir føroyingar taka avleiðingarnar av 11. septembur 2001. Vit skulu nevniliga í samband við fígging av terrorismu og hvítvasking av peningi lata eina rúgvu av upplýsingum til bankarnar**

BANKABRÆV
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Tey flestu hava longu fingið brævið, hini fáa tað heilt skjótt. Soleiðis er støðan við brævinum, sum bankarnir senda út til øll fólk, har vit millum annað skulu lata kopi av samleikaprógvi við. Bankarnir fylgja bara lógini, men tað kann sýnast undarligt, at 33 tingfólk eru fyri at gera so stór inntriv í persónligu upplýsingarnar hjá fólki.

Tað var nevniliga 1. juli í 2008, at lógin kom í gildi, sum millum annað inniber, at vit skulu lata hesar upplýsingar til bankan og onnur. Hetta var eftir, at eitt samt Løgtingið við triðju viðgerð atkvøddi fyri, at lógin um fyribyggjandi tiltøk ímóti hvítvasking av vinningi og fígging av yvirgangi.

Tað er rímiliga óvanligt, at Løgtingið er einmælt, og tí kann tað hava eitt sindur at siga, at Tingið vanliga er farið í summarfrítíð 30. mai, tá lógin varð samtykt.

1. mars skulu øll hava svarað spurningunum frá bankunum. Hetta eru ikki bara vaksin, men øll fólk í Føroyum. Sýtir tú, so er einasta revsing, ið kann koma, at bankin stongir kontuna hjá tær, men langt áðrenn tað fær bankin trupulleikar við fíggjareftirlitinum og øðrum bankum. Tó er tað sera trupult at virka í samfelagnum uttan nakra bankakonto.

Hinvegin dugir Janus Petersen, formaður í Felagið Føroyskir Peningastovnar, illa at skilja, at fólk skulu hava nakrar trupulleikar við at svara spurningunum frá bankunum, tí hetta eru minni upplýsingar enn bankin longu hevur.

### Dátueftirlitið ímóti

Hóast Dátueftirlitið fekk hoyringsskriv í málinum, so var tað ikki hoyrt. Tað skrivaði millum annað í hoyringssvarinum at dátueftirlitið metir, at lógaruppskotið hevur við sær fleiri sera umstríddar spurningar so sum athalda eyga við kundum, og at melda hesar til løgregluna, uttan at kundin fær kunning um hetta. Hetta skrivaði Dátueftirlitið 19. apríl í 2007.

Í dag hevur tað ikki so nógvar viðmerkingar.

- Skipið er siglt frá okkara síðu, sigur Ingunn Eiriksdóttir, stjóri á Dátueftirlitinum, men hon leggur afturat, at eftirlitið ikki hevur skift støðu, tí hetta er at fara langt inn um persónsupplýsingalógina, sum við nýggjum lógarteksti er skúgvað til viks.

- Heimurin í dag er eisini háttaður soleiðis, at vit longu eru í einum eftirlitssamfelagið, so hetta er ikki at fara so øgiliga nógv longri, sigur Ingunn Eiriksdóttir. Sum metir, at hetta kundi verið gjørt smidligari, men at talan er um ein lóg, sum er allastaðni í heiminum, og tí verður tað gjørt á sama hátt í Føroyum.

Viðvíkjandi p-talinum hevði Dátueftirlitið eisini eina greiða støðu í hoyringsskrivinum.

- Dátueftirlitið mælir tó til, at hesin spurningur verður gjølliga umhugsaður, tí hetta kann møguliga hava við sær, at persónstalið kann latast víðari av landinum. Hugsast kann, at øll lond ikki neyðturviliga hava somu vernd av persónstalinum, sum tann føroyska persónsupplýsingarlógin hevur, skrivaði tað.

Hetta vil við øðrum orðum siga, at tað, sum skuldi



*Síðan 11. septembur 2001 eru nógv tiltøk sett í verk at forða fyri yvirgangi. Eitt av hesum er lógin um fyribyggjandi tiltøk ímóti hvítvasking av vinningi og fígging av yvirgangi*

**Dømi um illgrunasamt virksemi**

- Kundin er afturhaldandi við upplýsingum
- Kundin er óvanligur
- Óvanliga gjaldingar
- Stórar kontantar gjaldingar

*Hetta stendur alt í vegleiðingini frá fíggjareftirlitinum*



Nýggjar reglur um hvítvasking seta krøv um samleikaprógv

Góðu kundar í føroysku peningastovnunum,

Komandi tíðina fara peningastovnarnir í Føroyum at heita á kundar sínar um at lata inn avrit av samleikaprógvi. Eisini verða kundarnir biðnir um at útfylla oyðublað.

Orsøkin til hetta er nýggj lóggáva, ið peningastovnarnir skulu ganga undir.

Tað er lóggávan um at forða fyri hvítvasking av peningi og fígging av yvirgangsvirksemi, ið áleggur øllum peningastovnum í Føroyum at útvega sær avrit av samleikaprógvi frá kundunum. Eisini skulu peningastovnar tryggja sær, at kundaviðskifti eru so væl lýst sum gjørligt.

Lóggávan hevur m.a. sum endamál at tryggja, at Føroyar verða roknaðar sum eitt land, ið ger sítt til at fyribyrgja hvítvasking av peningi og fígging av yvirgangsvirksemi.

Vónandi hava kundar okkara forstáilsi fyri hesum og taka væl móti brævi, ið peningastovnarnir senda út ein av komandi døgunum.

Blíðar heilsanir,

Felagið Føroyskir Peningastovnar

Eik FØROYABANKI Norðoya Sparikassi Suðuroyar Sparikassi

VINNUHÚSIÐ HOUSE OF INDUSTRY